# Bussleiðin gjøgnum kvørnina

**Tilboðini uppá busskoyringina í Tórshavnar Kommunu eru komin inn, og nú skal ein nevnd meta, hvat tilboð er hitt besta. Eftir ætlan byrjar busskoyringin eftir nýggja leistinum í februar 2003**

BUSSLEIÐIN
*Heri á Rógvi*




Tað vera framvegis teir reyðu bussarnir, sum fara at koyra fólk runt í høvuðsstaðnum. Áhugin fyri at veita hesa tænastu fyri kommununa er stórur.
*Mynd: Finnur Justinussen.*

Hósdagin 15. august 2002 kl. 13.00 vórðu tilboðini uppá busskoyringina í Tórshavnar kommunu latin upp.

13 høvdu biðið um tilfar, harav bjóðaðu 7 uppá alla, ella partar av busskoyringini.

Við verandi skipan eru tað fýra veitarar, sum røkja bussleiðina fyri kommunan, og hesir hava verið teir somu síðani bussleiðin byrjaði at virka fyrst í áttatiárunum. Sáttmálin er endurnýggjaður á hvørjum árið. Netto kostar tað Tórshavnar býráð ellivu milliónir um árið at reka bussleiðini. Brutto er kostnaðurin 14 mió, har tríggjar milliónir eru inntøka av billettum .

Eftir tilboðunum at døma, so kann hetta við busskoyring gerast bíligari í Havnini. Innkomnu tilboðini vóru millum 6,2 milliónir og 11,9 milliónir um árið, uttan mvg. Tilboðini vóru eitt sindur ymisk, har onkur bjóðaði uppá allar leiðirnar, og onkur bjóðaði uppá eina ella fleiri. Tey, ið bjóðaðu vóru: Smápartafelag undir stovnan v/Una Mortensen, Sp/f Gundurs Bussar, Sp/f Gundurs og P/f Gunnleifs bussar, Bergur Johannesen, Smápartafelag undir stovnan Hallurs bussar, Sp/f ABS-Transport v/Olaf Andreassen og P/f Mouritsens Bussar.

Bogi Haraldsen á teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu, sigur, at henda nýggja skipanin væntandi verður munandi lættari at samskipa í framtíðini.

Veitararnir fáa eitt gjald fyri teir tímar, teir koyra, og býráðið fær allar inntøkurnar frá koyringini. Kommunan ætlar eisini at seta eina nýggja billett-skipan í nýtslu, ið skal vera meira modernað og elektronisk.

Jan Christiansen segði í sambandi við útbjóðingina, at tað ikki hevði størstan týdning at gera leiðirnar bíligari, men heldur at borgararnir fingu eina betri tænastu. Millum annað varð sett fram sum krav, at bussarnir skulu vera nýggir og lágir, soleiðis at lætt er at koma í og úr bussunum. Eisini er tað ein spurningur um at plasera ábyrgd. Áður hevur tað verið rættiliga torført hjá kommununi at halda skil, hvør átti ábyrgdini, um okkurt óregluligt skuldi stungið seg upp, men nú verður eitt greitt ábyrgdarbýti sett upp. Talan verður í framtíðini um fýra leiðir í Havn. Afturat hesum verður so eisini ein skúlaleið og ein leið, ið umfatar Kollafjørð og Kaldbak.

Tað verður framvegis ein hálvur tími millum fráferðirnar hjá bussunum um dagarnar, men um kvøldið verður ein tími ímillum. Enn er ikki gjørt av, um koyrt verður sunnudagar og seint leygarkvøld. Onkur hevur eisini tikið hesar koyringar við í sítt tilboð, men onkur hevur ikki tikið hetta við.

Bogi Haraldsen sigur, at teir, tá tilfarið er viðgjørt, væntandi fara at tosa nærri við tann, ið skal koyra, um prísir fyri at koyra seint leygarkvøld og sunnudag.

Orsøkin til, at kommunan ikki er so áhugað fyri at koyra sunnudag er tann, at so ógvuliga fá fólk nýta bussleiðin sum er hendan dagin. Talan er um millum 60 og 100 fólk, ið vanliga ferðast við bussleiðini sunnudagar.

Ein nevnd, ið býráðið setir, fer nú at taka støðu til tilboðini. Eitt tilmæli verður væntandi lagt fyri teknisku nevnd, og síðani verður tað býráðið, ið fer at taka støðu til málið.

Keypa bussarnar

Av teimum fýra verandi veitarunum valdur bert tveir teirra at bjóða uppá bussleiðin í hesum nýggja útbjóðingarumfarinum. Talan er um Bláhamars bussar og AB-Bussar, sum ikki valdu at bjóða uppá bussarnar hesaferð.

Bogi Haraldsen sigur, at kommunan fer at keypa allar bussarnar, ið verða nýttir til býarbusskoyring sum er. Ætlanin er so, at teir komandi veitararnir skulu keypa bussarnar aftur frá kommununi fyri sama prís, ið kommunan keypti teir fyri. Hetta verður gjørt fyri ikki at koma nøkrum í óføri orsakað av nýggju bussskipanini.

# Edda – endabresturin




*Edda verður stóri endabresturin á ársins Listastevnu*

Nú fer megintiltakið á Listastevnu Føroya av bakkastokki. Talan er samstundis um tøkniliga mest krevjandi tiltakið í skjótt tjúgu ára søgu Norðurlandahúsins. Tað er framførslan »Edda – feigdargullið«, sum Sequentia framførir leygarkvøldið og sunnukvøldið. Í sambandi við sýningina er m.a. nýtt gólv lagt á í Høllini í Norðurlandahúsinum, tí skinnarar og altskyns tøkni skal festast og leggjast niður í gólvið. Havnar Timburhandil hevur latið tilfarið ti l nýggja gólvið, sum Birgir Sondum og hansara menn hava lagt á. Eisini verður hópin av serstakari ljós- og ljóðútgerð nýtt til framførsluna. Ljósmaður í Norðurlandahúsinum er Zacharias Guttesen, meðan Óla Jákup í Dímun er ljóðmaðurin.



# Ferðavinnan samlar træðrirnar

**Skulu vit menna ferðavinnuna enn meira, so er neyðugt at fólk í vinnuni hittast fyri at práta saman. Tað sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráðnum, nú Ferðaráðið á øðrum sinni skipar fyri verkstovu fyri føroysku ferðavinnuna**

FERÐAVINNA
*Orð: Jón Brian Hvidtfeldt*
*Myndir: Finnur Justinussen*




*Um 40 fólk úr ferðavinnuni vóru savnað til verkstovu á Hotel Føroyum fríggjadagin*

Umleið 40 fólk, umboðandi føroysku ferðavinnuna, hittust fríggjadagin á Hotel Føroyum til eina verkstovu. Endamálið er at samla træðrirnar, nú vinnan fyrireikar seg til at taka ímóti ferðafólki næsta ár.

- Vit meta, at besti háttur at knýta ymsu partarnar í føroysku ferðavinnuni tættari at hvørjum øðrum, er at skipa fyri einum tílíkum degi, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya.

Dagarnar 11. og 12. september verður stóra ferðavinnustevnan West Norten Travel Mart í Íslandi, og verkstovan er ein liður í fyrireikingunum til stevnuna. Gistingarhús, fyriskiparar av útferðum, flutningsfeløg og onnur hava her møguleika at vísa fram og selja sína vøru til teir føroysku ferðasmiðirnar, sum í næsta mánað fara til Íslands at selja Føroyar sum ferðamannaland. Ferðasmiðirnir eru tey, sum smíðja og selja lidnar »pakkatúrar«, har útlendsk ferðafólk keypa ferðina, uppihald og útferðir, áðrenn tey fara heimanifrá.

Databasi skal loysa gistingartrupulleikan

Størsti trupulleikin hjá føroysku ferðavinnuni er framvegis tey alt ov fáu gistingarplássini, serliga í høvuðsstaðarøkinum. Heri Niclasen sigur, at Ferðaráðið kundi hugsað sær, at øll gistingarpláss í landinum, bæði á gistingarhúsum og eisini í summarhúsum og líknandi, vóru savnað í ein stóran felags databasa hjá vinnuni. So bar altíð til, eitt nú hjá ferðasmiðjunum, at síggja, hvar gistingarpláss eru tøk. Eisini hevði tað lætt munandi um tað tíðum tunga samskifti, tá fólk skulu ringja aftur og fram upp til fleiri ferðir, fyri at finna út av, um t.d. nakað hús er tøkt at leiga í Sandoynni, vísir Heri Niclasen á. Hann metir, at ein tílíkur databasi hevði kostað umleið 300.000 krónur at gjørt. Ferðaráðið fer tó ikki skjálvt undir at gera arbeiðið, tí initiativið má koma frá sjálvari vinnuni, sigur Heri Niclasen.

- Tí ynskir vinnan ikki av fullum huga ein tílíkan databasa, so fæst hann ikki at virka eftir ætlan. Leiklut-urin hjá Ferðaráðnum kundi, sum ein óheftur stovnum innan ferðavinnuna, verið at umsitið databasan, sigur Heri Niclasen. Hann metir, at tað eigur at bera til at fáa fígging úr eitt nú Vinnuframagrunninum til at gera databasan.

### Ferðaráðið samstarva við Hagstovuna

Undanfarin ár hevur Bornholms Forskningscenter gjørt kanningar og metingar fyri Ferðaráðið av, hvussu nógv ferðafólk koma til Føroya, hvaðan tey koma, hvat tey leggja eftir seg, o.s.fr. Men nú ætlar Ferðaráðið at samstarva við Hagstovuna, sum so skal fáa upplýsingarnar til vega. Upplýsingarnar hava stóran týdning, tá Føroyar skulu marknaðarførast sum ferðamannaland uttanlanda, umframt at tær kunnu virka sum eitt barometur fyri, hvat vinnan kastar av sær til føroyska samfelagið.

### Fiskiheimasíða, gongu- og súkklutúrar

Ferðaráðið fer næsta ár at royna at bøta um umstøðurnar hjá ferðafólki, sum ynskja at royna seg við tráðuni á føroysku vøtnunum og áunum, meðan tey vitja. Arbeitt verður í løtuni við at gera eina nýggja fiskiheimasíðu, sum er serliga ætlað stuttleikafiskarum. Har skal bera til at finna upplýsingar um áir og vøtn, sum eru væl egnað til stuttleikafiskarí við tráðu, eins og til skal bera at finna allar praktiskar upplýsingar har, t.d. um hvussu ein sleppur á staðið og hvørji loyvi krevjast.

Tveir nýggir faldarar skulu eisini gevast út áðrenn næsta ferðamannaár byrjar. Annar er ein nýggur faldari, sum greiðir frá gongutúrum kring alt landið. Faldarin kemur í staðin fyri fimm gamlar faldarar, sum hvør í sínum lagi lýsa túrar í ymsum pørtum av landinum. Hin nýggi faldarin vísir á ymiskar súkklutúrar, sum ferðamaðurin kann royna.

### Væntar at árið fer at hilnast væl

Hóast tað enn er ov tíðliga at seta tal á, hvussu nógv ferðafólk leggja leiðina til Føroya í ár, so metir stjórin á Ferðaráðnum, at árið fer at hilnast væl.

- Fólk í vinnuni, sum eg havi tosað við, lata sum heild væl at árinum, sigur Heri Niclasen.




*Á verkstovuni høvdu ymsu partarnir í ferðavinnuni høvi at hitta hvønn annan*



*Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya*